# Lógin um vinnuligan fiskiskap

## Broytingaruppskot

## Stuttur samandráttur

## Juli - 2006

Nevndin, ið endurskoðaði lógina um vinnuligan fiskiskap, 2005-2006.

Tíðarætlan

Nevndin hevur lagt fylgjandi tíðarætlan fyri arbeiðið, ið, verður mett, er eftir, til hon kann handa landsstýrismanninum eitt endaligt lógaruppskot:

<table>
<tr><th>Juli</th><th>August</th><th>Sept. primo</th><th>Sept. medio</th></tr>
<tr><td colspan="2">Kunning til landsstýrismannin</td><td colspan="2">X</td></tr>
<tr><td colspan="2">Kunning til fylgibólkin</td><td colspan="2">X</td></tr>
<tr><td colspan="2">Upplýsandi tilfarið, skrivað</td><td colspan="2">X</td></tr>
<tr><td colspan="2">Almennar viðmerkingar, skrivaðar</td><td colspan="2">X</td></tr>
<tr><td colspan="2">Nýggjur lógartekstur, skrivaður</td><td colspan="2">X</td></tr>
<tr><td colspan="2">Viðm. frá landsstýrismanninum</td><td colspan="2">X</td></tr>
<tr><td colspan="2">Viðm. frá fylgibólkinum</td><td colspan="2">X</td></tr>
<tr><td colspan="2">Endalig handan av uppskoti</td><td colspan="2">X</td></tr>
</table>

Nevndin, ið endurskoðaði lógina um vinnuligan fiskiskap, 2005-2006. 2

Broytingar í mun til verandi lóggávu

1. Staðfesta ognarrættin
    1) Uppsøgn av loyvum
    2) Brúksskylda
    3) Tilfeingisgjald
    4) Møguleiki hjá tí almenna at selja rættindi
2. Fiskiorka og rættindi
    1) Broytingar í veiðiloyvunum
    2) Fiskiorka – fleksibilitetur
    3) Avhending
    4) Avhending, tá 3 mánaðir eru eftir av fiskiárinum
    5) Bólkur 5
3. Greiðari lógarverk
    1) BT
    2) Kanning av ognarviðurskiftunum
    3) Ymiskar orðingar
    4) Lógarverkið
4. Nýggj øki
    1) Kærur
    2) Annað havtilfeingi

Nevndin, ið endurskoðaði lógina um vinnuligan fiskiskap, 2005-2006. 3

1. Staðfesta ognarrættin
Grundhugsanin er, at tilfeingið í føroyskum sjógvi og tey rættindi Føroyar eiga uttan fyri føroyskan sjógv hoyra landinum til. Lógaruppskotið hevur amboð, ið skulu tryggja hendan ognarrætt, men samstundis geva vinnuni tryggar og skipaðar karmar at virka undir frameftir.
1.1 Uppsøgn av loyvum

Sambært § 13 í lógini um vinnuligan fiskiskap verða ávís fiskirættindi givin fyri 10 ár. Hetta 10 ára tíðarskeið verður endurnýggjað á hvørjum ári. Ein slík skipan viðførir, at ógjørligt er at gera størri broytingar, uttan at talan kann vera um ognartøku av givnum rættindum. Fyri at geva møguleikan til politisku skipanina at fremja broytingar, verða øll loyvi at fara úr gildi 10 ár eftir, at nýggja lógin er lýst. Talan er bæði um rættindi givin í fiskiloyvi og veiðiloyvi. Nevndin, ið endurskoðar lógina, hevur ikki evnað til uppskot um, hvat skal fara fram eftir, at 10 ár eru farin, men mælir til, at hesin spurningur verður avgreiddur í góðari tíð.
1.2 Brúksskylda

Við rættinum at fáa tillutað rættindi fylgir skyldan at gagnnýta hesi rættindi. Uppskotið inniheldur eina skipan við brúksskyldu, har kravið er, at 85% av tillutaðum rættindum skulu vera gagnnýtt í einum tvey ára tíðarskeiði. Verður hetta mark ikki nátt, verða rættindi skerd við muninum millum 85% og gagnnýtsluprosentið.Vera tillutað rættindi ikki nýtt yvirhøvur í einum 2 ára tíðarskeiði, fella hesi aftur til landið.
Ein annar partur av hesum er, nær fiskirættindi kunnu avhendast. 60% reglan, sum er í verandi lóg, verður umhugsað. Um 60% reglan verður varveitt, verður broytingin tann, at hon kemur at vera galdandi fyri øll fiskifør og allan fiskiskap, sum er tillutaður sum egnir fiskidagar ella egnar kvotur.
1.3 Tilfeingisgjald

Fiskirættindi eru loyvisrættindi, ið summi fáa at gagnnýta tilfeingi føroyinga í eitt givið tíðarskeið. Avmarkingin í atgongdini er neyðug, til tess at tryggja eina fíggjarliga og lívfrøðiliga burðardygga fiskiveiðu. Avmarkingin skapar eina tilfeingisrentu, sum kann geva teimum, ið hava fiskirættindi ein hægri vinning enn í øðrum vinnum. Hildið verður, at rætt er, at ein partur av hesum vinningi fellur til landið, soleiðis at allir borgarar landsins kunnu fáa gagn av hesum. Uppskotið hevur eina skipan, har álagt verður loyvishavarum eitt tilfeingisgjald, ið verður fastsett í mun til teirra avreiðingarvirði og rakstrarkostnaðir.
1.4 Møguleiki hjá tí almenna at selja rættindi

Í dag vera øll fiskirættindi givin frá tí almenna ókeypis. Samstundis er ein lívligur handil av fiskirættindum millum privatu luttakararnar í vinnuni. Hildið verður, at rætt er, at tað almenna kann luttaka í hesum eins væl og ein privatur. Tí verður skipan sett í verk, har tað er gjørligt hjá tí almenna at selja fiskirættindi, heldur enn at útluta tey ókeypis. Tey rættindi, talan verður um, eru øll rættindi, ið eru fallin aftur til landið, eitt nú í sambandi við brúksskylduna, tvingsilssølu har keyparin er útlendskur, eftir ymsum revsireglum ella á annan hátt.
Øll, sum í dag fáa tillutað egnar fiskidagar og egnar kvotur, fáa framhaldandi hesi rættindi tillutað.
Nevndin, ið endurskoðaði lógina um vinnuligan fiskiskap, 2005-2006. 4
2. Fiskiorka og rættindi
Lógaruppskotið hevur broytingar við sær fyri tey, ið reka fiskiskap. Hesar broytingar sum vera umrøddar her, verða gjørdar fyri at tryggja, at fiskiskapurin fer fram á skipaðan hátt, og at vinnan fær

karmar at virka undir, sum geva møguleikar fyri at laga raksturin til tað tilfeingið, ið hesi hava atgongd til.

2.1 Broytingar í veiðiloyvunum

Fyri at reka fiskiskap, krevst veiðiloyvi og fiskiloyvi. Eitt fiskifar kann bert hava eitt veiðiloyvi, men fleiri fiskiloyvi. Veiðiloyvið er góðkenning av fiskifarinum til ávísan fiskiskap. Fiskloyvið sigur, hvat fiskifarið kann fiska, hvar tað kann fiska og við hvørjum reiðskapi tað kann fiska og í hvøjrum tíðarskeiði tað kann fiska.

Veiðiloyvini vera skipað í hesar bólkar:

A) Veiða eftir uppsjóvarfiski
B) Veiða eftir botnfiski undir Føroyum, Íslandi og altjóða sjógvi
C) Veiða eftir botnfiski og rækjum í fremmandum og altjóða sjógvi ella
D) Annan fiskiskap

Við at áseta hesi veiðiloyvi, er gjørligt at staðfesta greiðari reglur fyri avhending og fortreytir fyri eini smidligari tillagingarskipan enn í dag. Orsøkin til hetta er, at núverandi skipan fevnir um góð 20 sløg av veiðiloyvum, og nevndin metir, at høga talið er ein forðan fyri handli og góðari tillaging. Ein lækking til 4 sløg av loyvum er stórur bati hesum viðvíkjandi.

2.2 Fiskiorka – fleksibilitetur

Í fiskidagaskipanini hevur grundleggjandi fortreytin verið, at fiskiorkan ikki skal økjast. Henda fortreyt verður ikki broytt. Nevndin ásannar tó, at trupult er at seta mát fyri fiskiorku, sum kann taka hædd fyri, hvussu ymisk fiskifør eru, og at effektivisering leypandi fer fram.

Lógaruppskotið broytir allýsingina fyri fiskiorku, soleiðis at fiskiorka verður eitt úrslit av fiskimegi (mált sum stødd, BT og maskinorku) og fiskitíð (mált sum fiskidagar). Hetta inniber, at um fiskifør vera skift út, er ikki neyðugt at nýggja fiskifarið hevur júst somu stødd, tí mótroknast kann í fiskidøgum. Um ynski er at broyta eitt fiskifar, kann hetta eisini fara fram, men verður mótroknað í fiskidøgum. Bæði hesi kunnu fara fram við einum marki uppá 15%.

Fyri fiskiskap uttan fyri fiskidagaskipanina er ikki krav um ávísa fiskiorku. Undantak er tó fyri lemmatrolararnar (bólkur 1), har hesir bert kunnu fremja broytingar, sum ikki økja fiskimegina.

Nevndin, ið endurskoðaði lógina um vinnuligan fiskiskap, 2005-2006. 5

2.3. Avhending

Møguleikin at avhenda veiðiloyvi og fiskirættindi verður varðveittur við broytingum. Veiðiloyvi kunnu leggjast saman innan fyri veiðiloyvisbólkarnar, sí omanfyri - 2.1). Tó eru serligar reglur fyri fiskifør í fiskidagaskipanini. Skotið verður upp, at onki ávíst mark verður fyri, hvussu nógv veiðiloyvi kunna leggjast saman undantikið tað, at ein samanlegging ikki viðførir at farið verður út um bólkamarkið (høvuðsbólkarnar) í fiskidagaskipanini.

Fiskifør í fiskidagaskipanini kunnu avhenda fiskidagar sínámillum í bólkunum 2, 3 og 4, tó ikki millum húk og trol ella øvugt. Fyri fiskiskap sum bert er reguleraður við tali av loyvum, kunnu hesi loyvi avhendast, t.d. garnaloyvi.

Fiskifør, sum ikki eru undir fiskidagaskipan, kunnu avhenda fiskirættindi innan fyri tann bólk, tey hava veiðiloyvi til. Tó verður greitt staðfest, at fiskifør, sum hava fiskirættindi eftir botnfiski uttan fyri føroyskan sjógv, kunnu avhenda til fiskifør, sum hava veiðiloyvi til botnfisk undir Føroyum og Íslandi, men ikki øvugt.

Rætturin til av veiða av felagskvotu kann avhendast.

Lemmatrolarar (bólkur 1) kunnu bert avhenda sítt loyvi til annan í hesum sama bólki, men kunnu tó vera við í avhendingum av øðrum rættindum í føroyskum sjógvi, t.d. fiskiloyvi til gulllaks.

Øllum kunnugt, so er høvuðsbólkur 5 ikki skipaður við veiðiloyvum og nevndarinnar tilmæli er, at samanlegging í hesum bólki framhaldandi ikki verður møgulig.
2.4 Avhending, tá 3 mánaðir eru eftir av árinum, verður avtikið
Í fiskidagaskipanini hevur verið gjørligt at avhenda millum bólkar, tá 3 mánaðir eru eftir av árinum. Hetta verður broytt soleiðis, at hetta ikki ber til longur. Henda broyting verður framd, tí hildið verður, at hesin møguleiki flytir fiskiskapin frá einum fiskaslagi til annað, sum dagarnir upprunaliga ikki vóru ætlaðir til.
2.5 Bólkur 5
Viðurskiftini hjá bátum undir 15 BT verða grundleggjandi broytt. Skipanin við 5A og 5B verður varðveitt, men verður markið millum hesar broytt, soleiðis at 5A bert er til útróðrarbátar, sum veruliga hava hetta til vinnuveg. Hesir fáa tillutað dagar pr. bát. Allir føroyskt skrásettir bátar undir 15 BT kunnu frítt fiska og avreiða. Hesir bátar fiska av fiskidøgum í bólki 5B. Hesin bólkur fiskar av felags fiskidøgum.
Nevndin, ið endurskoðaði lógina um vinnuligan fiskiskap, 2005-2006. 6
3. Greiðari lógarverk
Øll lógin um vinnuligan fiskiskap er gjøgnumgingin, og eru broytingar framdar í hesum sambandi. Summar av hesum broytingum er at neyvlýsa ávísar orðingar, meðan aðrar eru framdar, fyri at fáa eitt greiðari lógarverk, tó uttan at innihaldið í reglunum er broytt. Henda gjøgnumgongd hevur verið neyðug eftir tær mongu broytingarnar, lógin hevur verið fyri. Hildið verður, at neyðugt er, at lógarverkið á hesum øki fær ein nýggjan bygnað, sum er lesarum, brúkarum og umsiting at gagni.
3.1 BT
Øll før eru máld upp. Altjóða reglur krevja, at før yvir 24 metrar verða máld í BT eftir altjóða reglum (International Convention on Tonnage Measurement of Ships, 1969). Fyri før undir 24 metrar er ikki krav, at hesar reglur vera nýttar, men hesar reglur vera tó nýttar til uppmáting av fiskiførum niður til 15 metrar. Verandi fiskifloti er partvíst uppmáldur í BT og partvíst eftir gomlu skipanini BRT. Hesar eindir kunnu ikki samanberast, og elvir hetta til trupulleikar í sambandi við samanlegging av veiðiloyvum og avhending av fiskidøgum. Lógaruppskotið nýtir bert BT, og tí verður eisini eitt beinleiðis krav, at um avhending ella samanlegging skal fara fram, skal fiskifarið vera uppmált í BT. Við hesi skipan verður harvið farið frá tí sokallaðu “rúmmeturregluni” (longd x breidd x hædd) til at nýta BT burturav.
3.2 Kanning av ognarviðurskiftunum
Ognarviðurskiftini í føroysku fiskivinnuni hava fingið nógva umtalu. Nevndin heldur ikki, tað er neyðugt at broyta reglunar um, at 1/3 av eigaraskaranum kann vera útlendingar. Tó er meira gjørt burturúr heimildunum, tá hesi viðurskifti skulu kannast, og eru ávís viðurskifti sett í lógina, sum t.d. fráboðanarskylda.
3.3 Ymiskar orðingar
Ymiskar orðingar í lógini eru broyttar. Orðingin “ogn Føroya fólks” er broytt. Orsøkin til hesa broyting er, at hugsanirnar, um hvat henda orðing merkir, eru nógvar, tó uttan at greitt er, hvat verður lagt í hesa orðing. Í uppskotinum er í staðin nýtt orðingin “ogn landsins”, og er orðingin nærri lýst í viðmerkingunum til greinina.
Lógin um vinnuligan fiskiskap hevur eina orðing um, at veiða ikki skal blakast útaftur. Hildið verður, at rættari er at nýta orðið fisk, tá veiða kann vera so mangt. Hartil er ein áseting, ið heimilar landsstýrismanninum at seta reglur, um, at onnur veiða enn fiskur skal førast til lands.
Eitt av endamálunum í verandi lóggávu er at skapa møguleikar fyri vinnuligum virksemi kring alt landið. Henda orðing er ikki við í lógaruppskotinum.

Grein 28, stk. 2 í verandi lóg, um vegleiðandi býti av fiskastovnunum millum skipabólkar, er ikki við í lógaruppskotinum. Hildið verður, at henda áseting hevur ongan løgfrøðiligan týdning, men má metast sum eitt politisk stevnumið og hoyrir heima í einum slíkum.


3.4 Lógarverkið

Lógarverkið verður skipað við 4 lógum:

1. Lóg um fiskiskap í áum v.m.
2. Lóg um innaru og ytru fiskidagaleið og um friðað øki
3. Lóg um áseting av fiskidagtali
4. Lóg um vinnuliga gagnnýtslu av havtilfeingi føroyinga

Orsøkin til hesa broyting er viðv. 1) so er alt lógarverkið bygt á vinnuligt virksemi, sum fer fram á sjónum. Fiskiskapur í áum, vøtnum v.m. er ikki vinnuligur, og fer fram á landi. Hildið verður skilabest at hava hesi viðurskifti í eini lóg fyri seg. Viðv. 2) so verður hildið, at allar knattstøðurnar í samband við hesi viðurskifti eru ytri rammur um fiskiskapin, ið eru støðug, og eru hóskandi at hava í lóg fyri seg. Viðv. 3) so verður fiskidagatalið ásett á hvørjum ári. Her verður mælt til, at hetta verður gjørt í sjálvstøðugari lóg, sum hevur gildi í 1 ár. Seinasta lógin er so sjálvur heildarkarmurin um alt vinnuligt virksemi, ið hevur samband við fiskiskap og annað tilfeingi í hesum sambandi.


4. Nýggj øki

Í lógaruppskotinum eru tvey nýggi øki. Annað er ein kapittul um kærur, og hin er ein kapittul um ílegur og ílegutilfar, ið stavar úr sjónum – í lógini nevnd annað havtilfeingi.

4.1 Kærur

Uppskotið hevur skipan um kærunevnd, hvørjar avgerðir kunnu kærast, og hvussu viðurskiftini skulu vera í hesum sambandi.

4.2 Annað havtilfeingi

Frameftir má metast, at ikki einans fiskur hevur týdning sum mat- ella ídnaðarvøra, men at alt, sum er í havinum, íroknað fiskur, kann gagnnýtast serliga við atlitið at ílegu, ílegueginleikar og annað tilfar. Fyri at taka hædd fyri hesi menning, er ásett í lógini, at gagnnýtsla og leitan eftir øðrum havtilfeingi bert kann fara fram við góðkenning og møguligari samsýning til føroyska samfelagið.